


# Jólatiltak fyri børn í Føroyahúsinum

Leygardagin verður Jólatiltak fyri børn í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Á skránni verður leikur og søga til børnini. Børn fara eisini at syngja jólasangir.

Tiltakið endar við pakkum til børnini og einum drekkamunni. Úr Kristnastovu, ið fyriskipar tiltakið verður sagt, at øll eru sera vælkomin.

Tiltakið verður leygardagin 25. novembur kl. 14 til 15.30 í Vesterbrogade 17A.

**nud**

# Nú kemur bókin um Mikines




**Frá mánadegnum 27. november verður nýggja bókin um lívið og listina hjá S. J. Mikines at fáa í handlunum. Hetta er mest umfatandi verkið um listamannin higartil**

Útgávan av hesum stóra verki er komin í lag í sambandi við, at listamaðurin hevði verðið hundra ár í ár.

Tað er Nesútgáfan í Íslandi, ið stendur fyri útgávuni og íslendski listasøgugranskarin Aðalsteinn Ingólfsson hevur skrivað størsta partin av verkinum, tó hava eisini Bárður Jákupsson og Bent Irve staðið fyri nøkrum tekstum.

Í tíðindaskrivi sigur útgevarin, at bókin kastar nýtt ljós á lívið hjá Mikines. Eisini hevur bókin eina sera umfatandi savn av myndum. Nógv av verkunum, ið verða víst í bókini eru ikki áður almannakunngjørd.

Harumframt er eitt umfatandi yvirlit yvir allar sýningar, ið Mikines luttók á. Í Sosialinum í vikuskiftinum verður ummælið av bókini.

Bókin verður útgivin á trimum tungumálum; føroyskum, donskum og enskum og kostar 695 kr.

**nud**





SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki sum avloysara til Akfaradeildina at byrja 2. januar 2007. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 1 ár. Talan er um fulltíðarstarv.

UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir m.a. um:

· Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
· Skráseting av akførum
· Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
· Eftirstøðumál
· Kassauppgerð

FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. desember 2006.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo






TIMBURHANDILN SÓKNAST EFTIR...

SKRIVSTOVUFÓLKI

**Sum skrivstovufólk í Timburhandlinum hevur tú ymiskar uppgávur um hendi.**

**Uppgávurnar eru m.a.**

- At svara telefonini.
- Vanligt bókhaldsarbeiði.
- Aðrar fyrifallandi uppgávur.

Starvið er frá kl. 8.00-16.30, íroknað hálvan døgurðatíma.

**Vit rokna við at tú**

- Hevur teldukunnleika á brúkarastigi.
- Hevur hóskandi útbúgving (skrivstovuútbúgving e.l)
- Er ágrytin og hevur góðan røkjuskap.
- Hevur góð samstarvsevnir og ert tænastusinnað/ur.

Umsóknarfreistin er 27. november 2006 kl. 12.00, og starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin er sambært S&K.

Send umsóknina við próvskjølum og møguligum viðmælum til:

**Timburhandilin**
Heykavegur 4
Box 3038,
Fo-110 Tórshavn
Att: Eydna Hvalsrætt

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN
TÓRSHAVN • KAMBSDALUR